Toll- og Skattstova Føroya

# Starv innan vinnuskránna

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnis-skatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskatta-lógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Stovnurin er farin undir bygnaðarbroytingar. Samstarvið millum økisskrivstovurnar og leiðsluna í stýrinum skal mennast, og stovnurin skal veita borgarum og virkjum eina betri tænastu. Tær núverandi seks økisskrivstovurnar verða lagdar saman til tríggjar.

Í Suðuroki starvast 11 fólk. Høvuðsskrivstovan, har viðkomandi kemur at starvast, er á Tvøroyri.

Heimasíða www.tollskatt.fo

E-mail suduroy@tollskatt.fo

Søkt verður eftir einum starvsfólki til vinnuskránna á Suðuroki at byrja skjótast gjørligt.

**Høvuðsuppgávur**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um málsviðgerð í vinnuskránni. Harumframt at vegleiða og svarað fyrispurningum frá viðskiftafólki/vinnuni.

Viðkomandi, ið settur verður í starv, skal kunna tola, at broytingar verða framdar í starvsinnihaldinum vegna broytingar á stovninum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu helst hava roknskaparligan førleika og/ella HH-útbúgving.

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarar hava góðar málsligar førleikar og teldukunnleika.

Rætti viðkomandi er ein persónur, sum er sjálvstøðugur, arbeiðssamur, fyrikomandi og dugir at samstarva.

**Vit kunna bjóða**
Spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving.

Talan er um eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir**
Lønar- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Núverandi setanarøkið er Suðuroki, men fevnir annars um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, og tann persónur, ið verður settur, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Nærri frágreiðing um starvið fæst við at venda sær til Toll- og Skattstovu Føroya, Suðuroki, Margret Joensen, økisstjóra, á tlf. 30 84 00.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum v.m. og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi.

**10. oktober 2005**

**Toll- og Skattstova Føroya, Suðuroki**
Postsmoga 69
800 Tvøroyri

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A



## Val til eldraráðið

Sambært býráðssamtykt frá 23. juni 2005 skal Eldraráð veljast í Tórshavnar kommunu.

Eldraráðið, sum hevur 5 limir og 5 varalimir, ráðgevur kommunustýrinum í øllum eldrapolitiskum spurningum og er bindilið millum teir eldru borgararnar og kommununa.

Val til Eldraráð er 4. hvørt ár fyrstu viku í oktober, hesa ferð tó síðstu viku í november, og situr fyrsta ráðið frá 1. januar 2006 til 31. desember 2008.

Valevni, sum ynskja at stilla upp, geva skrivliga boð um hetta í seinasta lagi 1. november 2005, kl. 16.00, hjá valnevndarformanninum ella kommununi. Saman við valevnisfráboðanini skulu undirskriftir fylgja við hjá í minsta lagi 5 stillarum, sum lúka treytirnar fyri valrætti til Eldraráðið.

Bara valevni, sum rættstundis hava boðað frá, og sum rættstundis hava sent inn stillaralista, kunnu verða uppstillað.

Valevnislistar at fylla út fáast í Snarskivuna ella á heimasíðuni www.torshavn.fo.

Valbæri og atkvøðurætt hava allir borgarar í kommununi, sum valdagin hava fylt 60 ár.

Atkvøðurætt hava bert tey, sum standa á vallistanum.

Valið fer fram við brævatkvøðu, og verður atkvøðuseðil sendur øllum borgarum, ið standa á vallistanum.

Brævatkvøðurnar skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi 29. november 2005, kl. 12.00.

Valið verður síðani alment uppgjørt sama dag, kl. 17.00, á torginum í Snarskivuni.

Um veljari hevur ikki fingið atkvøðuseðil, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal sum skjótast boðast Snarskivuni frá hesum.

*Valnevndin fyri Eldraráðið*



www.torshavn.fo


# Super teldutilboð til alla familjuna




**Sera góð telda við flatskermi**
- AMD Sempron 3000+ processor
- Asrock K8Upgrade-1689 Bundkort
- 512MB PC3200/DDR400 Ram
- 256MB GeForce FX5500 Grafikkort m/TV-out
- 160GB Maxtor Harddisk, 8MB, 7200RPM
- Liteon DVD-Rom 16X / 48X
- Liteon DVD-Brænder m/Dual Layer (8.5GB)
- Nero Suite Software
- 5.1 Kanals lydkort (ind- og udgang)
- 10/100Mbit Netkort, til bl.a. ADSL
- 8 x USB 2.0 Porte
- Colors-It kabinet L8010-C43 m/400watt

**Ring og hoyr nærri**

**TELDUHJÁLPIN**
tel 421 097 · telduhjalpin@yahoo.dk

## MERKISDAGAR

Við at ringja 809022 kanst tú senda heilsanir við fjarriti, sum er ein vøkur heilsan á snøggum pappíri.

Í dag verða øll fjarrit send móttakaranum við posti.

Nærri fæst at vita á:

**FJARRIT**
Tel 80 90 22

FØROYA TELE
www.tele.fo - tel 30 30 30

**LEIGA AMBOÐ & MASKINUR**

Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

www.sosialurin.fo